

– Eg máli tað eg síggi, sigur Arnhold Vegghamar

# Eg máli sum eg síggi tað

REPORTASJA

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*
*Jens Kr. Vang (myndir)*

- Eg búgvi so norðarlaga, at eg havi ikki so nógv samband við umheimin, annað enn bygdarfólkið her á Viðareiði. Akkurát nú havi eg einki lørift eftir. Eg havi einki lørift havt nú í tríggjar vikur, so eg má heldur fara til Klaksvíkar eftir lørifti, sigur Arnhold Vegghamar, ið er 65 ára gamal og listamaður. Hann er miðalmaður í útsjónd, yvirvørrin prýdd við einum dámligum yvirskeggi, og hann er fegin um vitjanina.

Hann hevur málað málningar, síðan hann var blaðungur. Málningarnir eru sermerktir. Íblásturin er mangan tey høgu fjøllini kring Viðareiði, grýtuta lendið og velduga náttúran. Og hyggur tú bara eftir motivinum, so eru málningarnir hjá Arnoldi kanska ikki so serstakir. Tað eru litirnir, sum lyfta teir upp, og gera teir til eina serliga uppliving.

- Eg máli tað eg síggi, sigur Arnold Vegghamar og ressar sær á sofuni, ið stendur undir einum sera máttmiklum málningi. Ein vetrarmynd av mølini í Eiðsvík við Fugloynni úti í havsbrúnni. Teir draga bát niðan gjøgnum mølina, ið hevur eina sterka grøna farvu. Malargrótið sær út sum bomm, eiturbomm. Steinarnir broyta skap allatíðina, meðan tú hyggur at teimum.

- Hatta er malargrót, tað liggur ongantíð stilt, í næsta uppgangi sær heilt øðrvísi út á Mølini, sigur Arnhold.

Fugloyggin sær so ísakøld út, har hon liggur sum eitt stórt ísfjall langt burturi.

- Men hóast kuldan, so lívir hon nakað hjá okkum og nakað fjálgt er við henni, sjálvt á vetrardegi, sigur listarmaðurin og vil líkasum verja Fugoynna, tá eg greiði frá tí kulda, ið kemur yvir meg, tá eg hyggi eftir myndini.

- Hesin málningurin er ikki til sølu, sigur Arnhold, tá hann sær, at grádigheitin kemur í meg. Tað sum er í stovuni, selji eg ikki. Tú veit, tað er líkasum man blívur góður við málningarnar. Eg dugi ikki at mála ein slíkan málning aftur. Tað hevur nakað við sinnisstøðuna, tú er í, tá tú málar.

## Gamal drongur

Á stovubróstinum hanga tveir vakrir bringumálningar av tveimum ungum kvinnum. Tær eru ógvuliga stílreinar og hóast smáar í vavi, so fylla tær væl á bróstinum. Onnur er reyðhærd.

*Tú málar kvinnur, vakrar kvinnur, men eg síggi onga kvinnu her í húsinum?*

- Nú eri eg 65, so nú verður tað av ongum. Handan reyðhærda, hatta var ein, sum eg einaferð sá í Havn. Eg helt, at reyði hárliturin stóð so væl til bláa blusulitin, og eg tók hesa sjón við mær norður til Viðareiðis og málaði hana. Mær hevur altíð dámt so væl hasa myndina. sigur Arnold Vegghamar.

- Nú eri eg 65, so nú verður tað av ongum við konufólki. Ikki tí, eg havi kent kvinnur. Nútíðar konufólkið er so grenjut, tað tekur mótið frá mannfólki og eg trívist væl einsamallur, sigur Arnold og vil sleppa burtur úr evninum.

## Listin ikki einføld

- Mín list er ikki einføld. Lívið er heldur ikki einfalt og eg máli veruleikan, sum heldur ikki er einfaldur. Lívið er ikki bara nøkur strok og mín gongd í listini er ikki einføld. Málningar eru ikki í slekt við hvønn annan. Eg hoyri ikki til nakað listarligt rák, og tí má eg vera einsamallur, sigur hann.

Ein pastellmynd av Victor Danielsen hongur á vegginum og lekur um hvønn andaligan heimstað heimið hjá Arnold hevur. Myndin sýnir, at Arnold dugir handverkið og hann kann avmynda við fotografiskum hegni, um hann leggur í tað.

- Hann arbeiddi seg í hel, Victor, sigur Arnold og skeinkir kaffi. Tað er sterkt og svart og tjúkkar flísar av brúnukøku liggja lokkandi á einum talerki miðskeiðis á sofaborðinum, vit sita kring.

- Pastellin er so taknemmilig at arbeiða við, munandi lættari enn við oljumáling.

- Tær eru sukurfríar, sigur hann og bjóðar mær brúnukøku. Hann dregist sjálvur við sukursjúkuna, so vit hava nógv at tosa um, annað enn list.

- Eg havi teknað, síðan eg var smádrongur. Tað byrjaði í skúlanum. Fyrst mest við blýanti, sigur Arnold.

Á vegginum hongur ein blýantstekning av abbanum. Hon er meistaraliga teknað. Minnir ikki sørt um skitsurnar hjá Leonardo Da Vinci av apostlunum. Abbin kallaðist Júst Justesen og hevur verið deyður seinastu 47 árini. Abbin hevði týdning fyri Arnold. Ein onnur pastell hongur á vegginum. Hon er av Jógvan Heinesen, bónda í Ónagerði, hann doyði fyri nøkrum árum síðan.

## Óslætti hagin

Kaffi kølnar, meðan Arnold prátar, og eg skrivi. Yvir av mær hongur ein hagamynd. Hon hevur okkurt dragandi við sær. Tríggjar reyðar sólir daga undan fjallatromini og eg lati vera við at spyrja hví. Myndin er málað við stuttum penslastrokum og minnir ikki sørt um stílin hjá einoyraða hálendinginum Van Gogh.

- Hagin her hjá okkum er so óslættur og tí má eg viðhvørt brúka tey stuttu penslastrokini fyri at endurgeva tað eg síggi. Mær dámar eisini væl flatur, men stuttu penslastrokini eru góð í haganum, fer tú nær. Nú máli eg sjáldan úti longur. Tað eru hugamyndir eg máli. Eg máli tað eg havi sæð, taki tað innan úr heilanum og út á løriftið.

- Tá eg máli, havi eg bara ábyrgd av mær sjálvum. Øll kunnu fáa tað at líkjast, tað hevur ikki so stóran týdning fyri meg. Eg vil vera frælsur í míni list, tað hevur ómetaliga stóran týdning fyri meg. Eg hangi ikki fastur í nøkrum stíli, eg vil hava fríar hendur til at eksperimentera. Mínar myndir eru ikki í slekt við hvørja aðra. Eg máli skjótt, men eg orki ikki so væl longur, sum tá eg var yngri, sigur hann og fer upp at ganga fyri at rista tankarnar upp á pláss aftur.



– Pastellin er so deiliga takknemmilig. Victor, abbin og onnur hanga á vegginum í stovuni

*Hvat skilir tú við at vera frælsur?*

- At vera frælsur merkir, at ongin skal kunna leggja seg út í mína list. Tað er málið, tað sum eg síggi inni í høvdinum á mær. Tað er mín sannleiki. Torførast er at ganga frá eini mynd. Mínar royndir eru, at ein altíð skal royna at ganga frá eini mynd í góðari tíð, annars er vandi fyri at spilla hana. Eg royni ofta at bjarga málningum og tað er ikki lætt. Málningurin er sum eitt instrument, sum skal stemmast, sigur Arnold og hyggur ørkymlaður eftir myndamanninum Jens Kristian Vang, ið hevur sama trupulleika, stundum uppi undir loftinum og aðru løtuna niðri á gólvinum, fyri at finna røttu myndina av Arnoldi.

- Har sær tú hvussu argandi ein mynd kann vera. Hann hevur longu tikið 100 hesa løtuna, og tit skulu bara brúka eina.

## Eina í búri

Arnold vísir okkum niður í ateliérið, sum er í eystara endanum í kjallaranum. Vit fara niður gjøgnum trappurnar og niður í ein heilt vanligan kjallara, við tí óruddi sum har hoyrir til. Kjallarin er ikki innrættaður, uttan eitt rúm, rúmið har Arnold málar.

Og vit koma inn í ein heilt annan heim. Inni í ateliérinum er einki annað enn lutir, sum beinleiðis hava við málningalist at gera. Mitt á gólvinum er ein sáta av tómum málingatubum. Allastaðni er storknað máling og litspælið av henni er eitt listarverk í sær sjálvum. Rundanum eru málningar at síggja. Litfagrar myndir. Veldug landsløg og stór list.

- Mínir málningar eru ikki í slekt við hvønn annan, segði Arnold, meðan vit sótu í stovuni í áðni. »Eg vil vera fullkomiliga frælsur. Eg hangi ikki fastur í einum stíli, eg vil hava frælsi til at eksperimentera, segði hann eisini.

Og inni í ateliérinum er prógvið. Hesir málingarnir eru slett ikki í slekt við málningarnar uppi í stovuni. Fyri okkum daga tær stóru flaturnar og summarlitirnir. Nógv gult og ljóst og ein gerst heilt heitur um hjartað hendan kalda, vindmikla og ruskuta hósdagin í november. Ein hómar eina velduga virðing fyri skapanarverkinum og eina deiliga ósnobbuta medferð, sum tykist við frælsari rødd at rópa út í rúmið: »Eg eri eg og bara eg«.

Í einum horni standa tveir málningar við baksíðuni úteftir. Eg spyrji og fái at vita, at hatta eru tveir miseydnaðir. Spyrji aftur, um eg kann sleppa at síggja, og hann játtar. Ein stórfingin málningur. Nakrir bátar og skip liggja hjá eini grind eystur av á Eiðsvík. Teir eru klárir at fara inn í Hvannasund við henni, og ongin veit, um hon leggur beinini. Tað er ein sovorðin spenningur í myndini. Nøkur viðareiðisfólk standa á bakkanum og hyggja. Onkur kikar og øll vóna. Tey eru Alen Viderø í Miðstovuni, Jógvan Heinesen, Eysturi á Grømma, Óluva við einum barni, Janus og Hans Pauli Nybo og so er ein ókend.

- Eg máli, tað eg síggi, og hetta er ein hugamynd, sum eg havi tikið við mær heim av bakkanum. Eg var nøgdur, tá eg gekk frá myndini fyri 20 árum síðan, men ongin hevur skoytt um hana. Kanska skuldi eg pynta eitt sindur upp á hana, men tað er vandamikið, sigur Arnold. Vit tingast eina løtu og nú hongur málningurin, við grindafrøðini, í forstovuni hjá okkum við baksíðuni inni móti vegginum.

*Hvussu hevur tú tað, tá ein mynd ikki lukkast?*

- Eg nussi sjáldan við eina mynd. Ein má læra at vera djarvur, hørð penslastrok, eins og Mikines. Mikines málaði eisini vánaligar málningar. Men tá tað ikki eydnast, so gerist eg keddur og hopi.

## Abstrakt list

Arnold flytir seg nógv listarliga, og hann ferðast eisini innanfyri tað surrealistiska, men hann roknar ikki við at hann fer at mála abstrakta list.

- Abstrakt list er góð, tá hon kemur í lag, men talan er nokk meira um litsamanseting enn um mynd, soleiðis sum eg skilji eina mynd.

- Einføld list er ikki einsbetýðandi við góða list. Summar yrkingar eru so einfaldar, at ein veit ikki hvat tað er. Nøkur orð og so tøgn. Lívið er ikki einfalt, einki er einfalt. Eg havi eitt sindur torført við at skilja, at vaksnir menn sita og gera barnatekningar, sum fýra ára gomul børn tekna. Eg veit ikki rættuliga, hvat teir vilja. Tað tykist mær eitt sindur undarligt, at vaksnir menn vilja endurskapa tað, sum børn gera við gleði. Men listafólk skulu hava frælsi, og tí ber ikki til at siga hvat er rætt. Tað skal verða teimum væl unt, sum dáma abstrakta list. Listin verður altíð ein stór avbjóðing. Ein maður, sum eg haldi ógvuliga nógv av persónliga, er Ingálvur av Reyni, men eg skilji ikki hansara list, sigur Arnold Vegghamar.

- Í mínum hugaheimi var listin í hæddini, tá impressionistarnir vóru í velmaktini niðri á evropeiska meginlandinum, serliga í Fraklandi.

## Avbyrgt atelier

Pasiennur eru fyri teimum báðum vindeygunum í arbeiðsrúminum hjá Arnoldi, og tey venda suðureftir og stikk øvugt av norðurvendu vindeygunum hjá øðrum listamonnum hesu megin ekvator. Men ljósið uttan í frá hevur ikki so nógv at siga longur. Tað er ljósið innan úr Arnoldi, sum endar á løriftinum. Inni í rúminum eru seks neonljósrør, sum vinna á myrkrinum og sum sýna honum litleikin á løriftinum.

- Fyrr kundi eg ikki mála eina mynd um heystið, nú máli eg alt árið. Eg kann finna upp á ein sólríkan og ljósan dag at mála eina døkka mynd, og tað kemur eisini fyri myrkar dagar, at eg máli ljósar og heitar myndir. Tað lívgar upp í sinninum.

Arnold er útbúgvin gull- og silvursmiðjur. Sum heilt ungur fór hann til skips, men hann hevði ikki sjónáttúr og ringt svøvnlag, so hann legist uppi longu 20 ára gamal. Tað var tá hann byrjaði at mála. Hann fór til Danmarkar sum 24 ára gamal í 1957 at læra silvursmíð og hann málaði eisini niðri. Síðan eru nógvir málningar málaðir, og hann heldur nokk fram við at mála, so leingi hann orkar. Hann smíðar av og á prýðislutir til heimavirkini.

- Eg orki ikki so væl longur, sum fyrr. Eg eri eisini 65. Eg havi einki lørift í løtuni. Eg má fara at ringja til Havnar og bestilla. Tvey stór og tvey miðal, sigur hann.

Málningur Arnolds, málningurin, haðani allir málningar stava, heimbygdin Viðareiði, rembir sær spjødd og dovin, nú døgurðapottarnir eru komnir undir kók.

Heim Arnolds er violett og inni í teimum eru málningar við violettum litum. Violett er broytingarliturin og hann broytir eisini døkka november, nú Vegghamar aftur fer at keypa lørift, ið altíð er ein avbjóðing, er tú nærlagdur listamaður.



*Arnhold í atelierinum. Virkin er hann, tá góða lagið er á honum*